## Tíðindaskriv frá Hondbólts-gallaveitsluni

Aftur í ár verður skipað fyri hondbóltsgalla-kvøldi, hesuferð er tað ítróttarfelagið V.Í.F., sum skipar fyri.

Hetta er triðja árið á rað at skipað verður fyri tílíkari veitslu fyri 1. deild í hondbólti kvinnum og monnum, dómarum, venjarum, nevndum og hallarvørðum.

Veitslan verður í ítróttarhøllini í Vestmanna mikukvøldið 11. apríl kl. 20.00. Eins og undanfarnu árini verður nógv arbeiði lagt í, at hetta kvøldið skal gerast eitt gott kvøld – ein góður endi á hondbóltsárinum. Góður matur, Hilmar Jan Hansen skipar fyri, All That Rain spælir til dans aftan á og sum vanligt verður undan veitsluni atkvøtt um hvørji skulu vinna tey ymisku heitini í ár. Her umframt verður møguleiki hjá leikarum o.ø., ið koma langvegis frá, at gista og ætlanin er eisini at náttbussurin koyrir aftur til Havnar.

Tilmelding fer fram á fax nr. 424447 ella 332555 att.: Ingi Olsen.

## Talvið hesa vikuna

**GM Johnny Hector (2500) - John Arni Nilssen (2500)**
**3. division DK (7), 18.03.2001**

1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.Nc3 g6 4.d4 cxd4 5.Nxd4 Bg7 (John Arni kennir væl hesa støðuna og byrjan, og sjálvsagt er GM Hector eisini kendir í hesari støðu) 6.Be3 Nf6 7.Bc4 Qa5 8.0-0 0-0 9.Bb3 d6 10.h3 Bd7 11.f4 Nxd4 12.Bxd4 Bc6 13.Qd3 Rad8 14.Qe3 Nd7 (Báðir hava telva skjótt byrjunarspæl, hava brúkt 15 min. hvør) 15.Bxg7 Kxg7 16.Rf2 Qc5 17.Qf3 Nf6 (17...f5!? er væl møguligt) 18.Nd5 Bxd5 19.exd5 b5 20.Re1 (Hvítur hevur lítlan fyrimun) 20...a5 21.a3 b4 22.a4 Qd4 23.c3 bxc3 24.bxc3 Qb6 25.Bc4 Qc5 26.Ba2 Rb8 27.Kh2 Qa3! (John Arni hevur ongar ætlanir at taka a-finnuna, men heldur fáa gott spæl fyri finnuna) 28.Rxe7 Rbe8 29.Rc7 Re1 30.Bc4 Rfe8 31.f5? Qc1? (31...g5! 32.Re2 Qc1 33.Rxe8 Nxe8 og John Arni vinnur! Spell at hann ikki sá hetta. Hector segði seg eftir talvið at hava sæð hetta, og víst John Arna júst hendan møguleika) 32.Rxf7+!? Kxf7 33.fxg6+ Kg8 (33...hxg6?? 34.Qxf6+ Kg8 35.Qxg6+ Kh8 36.Qf6+ Kg8 37.Bf1 og hvítur vinnur) 34.Qxf6 Rh1+ 35.Kg3 Re3+ (35...Qe3+ 36.Rf3 Qe1+ 37.Kg4 Qe4+ 38.Kg5 Qxg6+ 39.Qxg6+ hxg6 40.Rf6 hvítur vinnur) 36.Kg4!



(36.Rf3? Rxf3 37.Fxf3 Fg5+ remis) Re4+ 37.Kh5 Qd1+ 38.Rf3 Re5+ 39.Kh6 John Arni gavst eftir ein gott spæl kortini. 1-0

# Neistin 70 ár




**Hondbóltsfelagið Neistin hevði mikudagin hátíðarhald í høllini á Hálsi, tí tað nú eru sjeyti ár síðani, at felagið varð sett á stovn**

ÁRSDAGUR
*Stefan í Skorini*

Nógv fólk varð komið saman at heiðra Neistan, hondbóltsfelagið, nú sjeyti ár eru liðin, síðani fólk tóku seg saman at stovna Neistan. Felagið sá dagsins ljós á vári í 1931, men ikki er greitt, júst hvør dagur tað var, tí fyrsta gerðabókin ikki er tøk.

Hýrurin var avbera góður í høllini og bæði ung og gomul høvdu lagt leiðina niðan á Nabb. Djóni Dalsgarð legði fyri við at bjóða øllum vælkomnum.

Havnar Ungdóms-hornorkestur spældi meðan fólk leitaðu eftir kenningum í høllini. Horntónleikurin gav ein festligan róm, og seinni var tann meira ópoleraði Sámal Ravnsfjall á pallinum og sang og spældi.

### Ballónir og lagkøka

Neistin hevði fingið bakarar hjá Gunleivi at gera eina risa lagkøku. Køkan ímyndaði merkið hjá Neistanum, sum er eitt flagg.

Bakararnir hava veruliga kýtt seg, tí køkan var nógvar metrar til longdar.

Tey nógvu smáu børnini stuttleikaðu sær óført við teimum 2000 ballónunum, ið felagið hevði fingið til vega til hetta serliga høvi.

Besta føðingardagsgávan hevði óivað verið eitt føroyameistaraheiti í fremstu kvinnu- ella mansdeildini. Tað fekk felagið í fjør, so tað kann kallast ein framskundað føðingardagsgáva.

Neistin hevur í fleiri ár lagt stóran dent á ungdómsarbeiði og hevur havt nógv góð ungdómslið gjøgnum árini. Neistin hevur verið ein partur av býarlívinum í høvuðsstaðnum í nógv ár (70), so tað er bara at vóna, at felagið ikki tekur fótin av spitaranum, hóast ellið er farið at merkjast.

Vit ynskja Neistanum tillukku og vóna, at felagið heldur á við at framleiða nakrar komandi landsliðsleikarar.



*Nógv fólk varð komið saman at heiðra Neistan, hondbóltsfelagið, nú sjeyti ár eru liðin*




# SKEMT 2000

## fæst í sølubúðunum kring alt landið
## Kostnaður 120,-







**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Sosialurin - 311820